# Meiri løn goldin til almenn

Sambært nýggjastu tølunum frá hagstovuni er tað bara innan almennar tænastur, at meiri peningur er útgoldin í fyrsta ársfjórðingi í 2009 sammet við sama tíðarskeið 2008. Tað er bara innan almennar tænastur, um hugsað verður um, høvuðsvinnur, at meiri peningur er útgoldin í higartil í 2009 sammet við sama tíðarskeið í fjør. Í prosentum er økingin 6,8 prosent, og í milliónum er økingin 55 milliónir krónur. Ringast stendur til í fiskivinnuni og aðrari ráevnisvinnu, har afturgongdin í lønum er umleið 15 prosent. Tilsamans er krónutalið 63 milliónir færri í ár í mun til í fjør. Innan ráevnisvinnu er einasti glottin alivinnan, har umleið 11 milliónir krónur fleiri eru goldnar út í lønum. Hetta merkir somuleiðis, at í hinum ráevnisvinnunum er minkingin 74 milliónir krónur. Eisini innan byggivinnu og aðra tilvirking er afturgongd. Har er afturgongdin umleið 11 prosent. Í tølum er hetta 37 milliónir minni enn í fyrsta ársfjórðingi í fjør. Fyrsta ársfjórðing í fjør vóru samlaðu lønarútgjaldingarnar 2,6 milliardir krónur fyrsta ársfjórðing, og higartil í ár er hetta tal eitt sindur omanfyri 2,5 milliardir krónur. Hetta vil við øðrum orðum siga, at 123 milliónir krónur færri er útgoldnar í lønum higartil í ár sammet við sama tíðarskeið 2008.



# 100 ára føðingardagurin hjá Ellen

Sum greitt frá í blaðnum fríggjadagin fylti Ellen Lützen 100 ár í gjár. Móttøka var á Lágargarði millum kl. 15 og 17, har ein hópur av fólki var inni á gólvinum. Ellen var væl fyri og fekk eitt prát við allar gestirnarnar.

Hon fekk ta vanligu heilsanina frá drotningini frá ríkisumboðsmanninum, og hon bað hann endiliga heilsa drotningini aftur.

Talur vóru hildnar av Heðin Mortensen og Rosu Samuelsen. Tey vóru væl kunnað um lívið hjá Ellen. Helst hava tey skeitt í Sosialin.

Vit vóru sjálvsagt til staðar og hava nakrar myndir frá móttøkuni.

ó.



*Her er tað Marjun Poulsen, ið heilsar uppá Ellen*



*Heini og Malan sungu fyri ommuni*



*Eydna til høgru, dóttir Ellen, var komin úr Danmark við manninum Svend og soninum Finn*



*Ellendur, sum vaks upp hjá Ellen og Mogens, saman við vermammuna Katrinu, sum var gift við Viderø, prest*



*Suni Jacobsen, Matgith Thomsen og Jóannes Dalsgarð hava øll arbeitt hjá Valdemar Lützen*



*Kvinnurnar hjá Valdemar, son Ellen. F.v. Haldis, Sunneva, Elin og Nanna*



*Valdemar hjá Valdemar saman við grannunum Helmu og Óla Jákup Müller*



*Maria, Katrin og Sigrun vartaðu upp og gjørdu sítt til, at dagurin gjørdist so góður*